# Barnsburðaravloysari til Tvøroyrar kommunu

Søkt verður eftir barnsburðaravloysara fyri skrivstovufólk á býráðsskrivstovuni at byrja umleið hálvan august 2006. Talan er um fulltíðarstarv fram til umleið hálvan juni 2007.

**Starvið:**
Starvið umfatar alt vanligt skrivstovuarbeiði, bókhald og telefonavgreiðslu.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava góðan kunnleika til teldu. Kunnleiki til bókhald er ein fyrimunur.

**Løn og setanartreytir:**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Tvøroyrar kommuna**
Postboks 80
800 Tvøroyri

Umsóknir skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 12. juli 2006.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jónleyg B. Petersen á tlf. 37 10 85.




Søkt verður eftir **klinikkassistenti** at byrja 14. august 2006.

Umsókn við avriti av møguligum prógvi og viðmælum skal sendast Tannlæknastovuni áðrenn 5. juli 2006.

**Tannlæknastovan hjá Steintór Larsen**
Torkilskrókur 8 · FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444358 · stein@online.fo · fax 444602

# Summarfrí

Skrivstova felagsins er stongd í viku 30 frá 24. juli til og við 28. juli 2006.

Telefonráðgevingin við løgfrøðing felagsins fer í summarfrí tann 13. juli og byrjar aftur 17. august.

**Føroya Arbeiðarafelag**

# Endurlýsing

## av deildarleiðarastarvi á Familjudeildini á Føroya Barnaheimi

Vegna ov fáar umsóknir, verður deildarleiðarastarvið á Familjudeildini endurlýst. Starvið verður leyst til setan frá 1. oktober 2006 ella skjótast tilber.

**Um Familjudeildina:**
Á Familjudeildini arbeiða 7 starvsfólk í einum tvørfakligum toymi, øll við viðkomandi útbúgving.

Endamálið við arbeiðnum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðlað í at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og hvørjar trupuleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvør stuðul er best og mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

**Førleikakrøv til deildarleiðarastarvið:**
Vit sóknast eftir einum dugnaligum deildarleiðara, ið hevur royndir við familjuarbeiði og sum somuleiðis hevur leiðsluroyndir. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni og er til reiðar at ganga fremst í tí fakliga arbeiðnum á deildini. Harumframt hevur deildarleiðarin ábyrgdina av og skipar samskiftið við barnaverndartænastur, Almannastovuna, heilsusystrar, læknar, sálarfrøðingar, sosialráðgevarar, barnagarðar, skúlar, sjúkrahús, viðgerðarstovnar o.s.fr.

Á Familjudeildini verður í løtini arbeitt við at víðka og broyta virksemið á Familjudeildini og skal deildarleiðarin somuleiðis standa á odda fyri hesum arbeiði.

**Útbúgving:**
Hóskandi útbúgving krevst.

**Løn:**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, við mælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 4. august 2006.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Beintu Johannesen, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda vid Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn




**Útferðir í Norðoyum:**
Frá Hvannasundi og norður um Enniberg, ella runt Fugloy ella Svínoy.
Eisini beinleiðis til Svínoy og Fugloy eftir avtalu.
Vit eru til taks alt døgnið.
Ring: m/b. Alpha Pilot
telefon 22 08 49

Lesið Sosialin

**Pioner**
– hin vælumtókti plastbáturin



- Stoyptur í einum
- Við dupultum skrokki
- Søkkur ikki
- Góðkendur av Norsk Veritas
- Fæst í nógvum modellum
- Vit hava Honda leysamotorar til bátarnar

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Sosialurin 341800

**Mentamálaráðið**
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

# Mentamálaráðið søkir eftir undirvísingarleiðara

Eitt starv sum undirvísingarleiðari er leyst at søkja í Vinnu- og miðnámsskúladeildini. Talan er um eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv, sum fevnir um ymiskar uppgávur innan útbúgvingarøkið.

Umsóknarfreistin er mánadagin 3. juli 2006, kl. 16.00.

Meira fæst at vita á heimasíðu ráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv)



# Pakkifólk

Søkt verður eftir røskum pakkifólki til pakkadeild okkara, at arbeiða aðru hvørja viku.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja ella støkka inn á gólvið og spyrja eftir Bent.

**Hjá Gunleivi**
c/o P/f Vørður
Hoyvíksvegur 65 · postboks 1048
Tel 23 62 11 ella 31 21 61